# UMSÓKN UM LOYVI AT KOYRA VIÐ ÚTLENDSKT SKRÁSETTUM PERSÓNBILI Í FØROYUM

Sí vegleiðing og treytir á baksíðuni

At senda til:

**Akstovan**
Hoyvíksvegur 57
Postsmoga 3206
FO-110 Tórshavn
akstovan@akstovan.fo

## UPPLÝSINGAR UM EIGARA/NÝTARA

EIGARI ☒ NÝTARI ☐ *(SET KROSS)*

| | |
|---|---|
| Fult navn: | P-tal: |
| Bústaður uttanlands: | |
| Bústaður í Føroyum: | |
| Fartelefon: | Teldupostadressa: |

## UPPLÝSINGAR UM PERSÓNBILIN

| | | |
|---|---|---|
| Tjóðskapur: | | Skrásetingarnummar: |
| Merki: | Model: | Litur: |

## FRÁGREIÐING UM ORSØK TIL UPPIHALD VIÐ PERSÓNBILI:

**Undirritaði váttar undir revsiábyrgd at upplýsingarnar eru rættar.**

Við sekt, hefti ella fongsli upp til tvey ár verður tann revsaður, sum við vilja ella av grovum ósketni dylur ella gevur skeivar ella villleiðandi upplýsingar ella dylur upplýsingar fyri avgjaldseftirlitinum hjá Akstovuni. (Løgtingslóg nr. 33 frá 19. mai 2008 um avgjøld við skráseting av motorakførum, § 28, stk. 1, nr. 1 og stk. 3).

Staður og dagfesting

Undirskrift umsøkjarans

sendistovan ver. 46841/06/2020

AKSTOVAN

# VEGLEIÐING

**Lógarheimild**
Sambært § 31, stk. 2 í løgtingslóg nr. 33 frá 19. mai 2008 um avgjøld við skráseting av motorakførum (avgjaldslógin), kann Akstovan loyva persónum, ið hava fyribils tilhald í Føroyum, at flyta inn motorakfar til egna nýtslu í upp til 1 ár, uttan at umskráseta og uttan at avgreiða avgjøld eftir hesi lóg. Hesi motorakfør mugu ikki nýtast vinnuliga.

Motorakfør, ið fáa undantaksloyvi eftir hesum reglum, kunnu vera verandi í Føroyum í mesta lagi 12 mánaðir í einum 24 mánaða skeiði, uttan at umskráseta motorakfarið og rindað skrásetingargjøld.

Sambært § 68, stk. 2 í kunngerð nr. 34 frá 14. apríl 1983 um skráseting av motorakførum, skal akfarið skrásetast ella nummarspjøldrini takast av akfarinum og latast Akstovuni innan 14 dagar eftir, at eigari (nýtari), ið ikki býr her á landi, fær bústað her, eftir at akfarið er innflutt ella letur akfari til eigara (nýtara), sum býr her.

**Saman við umsóknini skulu vera hesi skjøl:**

1) Avrit av útlendskum skrásetingarskjali
2) Váttan um galdandi útlendska ábyrgdartrygging (grønt kort)
3) Váttan frá føroyskum arbeiðsgevara, útbúgvingarstovni ella líknandi um longd á útbúgvingar-/setanartíðarskeiði
4) Váttan frá Motorstyrelsen í Danmark „Tilladelse til fortsat registrering i Danmark ved udrejse mere end 185 dage“, (bert galdandi fyri donsk skrásett motorakfør)
5) Avrit av koyrikorti